## Nýggja gassleiðing

Ein norðurlendskt samtak hevur gjørt av at leggja eina nýggja rørleiðing, sum skal flyta gass av teimum norsku gassleiðunum í Norðsjónum til Noregs, Svøríkis og Danmarkar. Tað almannakunngjørdi tað almenna norska gassfelagið Gassco í gjár. Leiðingin verður umleið 800 kilometrar til longdar. Umframt Gasscao eru 16 fyritøkur í teimum trimum londunum uppi í verkætlanini. Noreg er tað triðstørsta gassútflytaralandið í heiminum.

## Nógv regn

Tað hevur regnað óvanliga illa í Danmark hendan mánaðin, og í gjár kundi danska veðurstovan staðfesta, at januar í 2007 er tann vátasti síðani 1988. Sambært tølunum hjá veðurstovuni hevur avfallið í hesum mánaðinum verið oman fyri 115 mm ímóti 113 í januar í 1988. Tað er annars tvær ferðir so nógv sum vanligt, tí meðalavfallið í Danmark í januar er 57 mm. Tað nógva regnið í seinastuni hevur elvt til vatnflóð í fleiri býum.

# Ungir mans fingið harðskapsdóm

**Tveir ungir mans vórðu í Føroya Rætti í gjár dømdir í einum harðskapsmáli, har teir báðir í felag høvdu sligið og sparkað ein annan á bæði kropp og høvd. Annar fekk ein treytaðan dóm upp á 30, meðan hin fekk 40 dagar treytaleyst fongsul**

DÓMUR
*Rólant Waag Dam*
*rolant@sosialurin.fo*

Teir báðir dømdu eru 17 og 18 ára gamlir. Yngri drongurin fekk 30 dagar treytað fongsul, meðan eldri drongurin fekk heili 40 dagar treytaleyst fongsul.

Tað var 16. juli í fjør, at hesir báðir løgdu á ein annan drong og framdu grovan harðskap móti honum. Tað var í samband við Vestanstevnuna, at dansur var í høllini á Giljanesi. Hesir tríggir byrjaðu at klandrast inni í høllini, og hildu so áfram uttanfyri.

Sambært ákæranum var talan um »vold i forening«. Teir báðir dreingirnir vórðu ákærdir fyri at hava sligið, sparkað hin á bæði andlit og kropp, umframt at teir vóru skuldsettir fyri at hava dragsað hin eftir asfaltinum.

Báðir noktaðu teir seg partvíst sekar á ákærunum.



*Báðir ungu menninir tóku við dóminum, men ákæruvaldið bað um umhugsunartíð fyri at vita, um málið skal roynast í landsrættinum*

*tilvildarlig mynd*

### Tóku við dóminum

Teir báðir ákærdu dreingirnir hava áður verið partur av einum harðskapsmáli, sum hevur verið í Føroya Rætti. Tá var talan um harðskap í felag móti einum yngri drongi. Tann 18 ára gamli var mettur at vera høvuðsmaðurin í tí málinum, og tann 17 ára gamli hevði eisini luttikið.

Aftrat tí var eitt annað mál fyri í rættinum í gjár, sum teir eisini vóru partar av. Hetta var minni mál um knallertir, men var tað eisini tikið við í dómin.

Báðir ungu menninir tóku við dóminum, men ákæruvaldið bað um umhugsunartíð fyri at vita, um málið skal roynast í landsrættinum.

## Næsti Vencil næstan fullfermdur




**Næsta nummar av skaldskapartíðarritinum Vencili er á veg**

ÚTGÁVA
*tíðindaskriv*

Ritstjórnin ger í hesum sambandi vart við, at freistin at lata inn tilfar er **hósdagin 1. februar 2007**. Nógv gott tilfar er komið inn, bæði upprunaføroyskt og týtt tilfar, men enn er tó nakað av plássi eftir.

### Øll kunnu senda inn tilfar

Øll kunnu senda inn tilfar til Vencil. Einastu treytir eru, at talan er um skaldskap á bundnum ella óbundnum máli á føroyskum, íroknað ritroyndir (essays), og at tilfarið er væl og virðiliga arbeitt ígjøgnum, áðrenn tað verður sent inn.

Tá ið freistin er farin lesur ritstjórnin alt tilfarið, sum inn er komið, ger viðmerkingar til teir einstøku tekstirnar og sendir teir aftur, soleiðis at rithøvundurin kann arbeiða tekstin heilt lidnan. Tey sum ikki fáa tekstirnar við í Vencil fáa eina vælmeinta grundgeving og nøkur góð ráð.

Tekstir skulu sendast teldutøkir á telduatsetrið: vencil@vencil.fo, saman við kontonummari og P-tali, sum skulu brúkast, um samsýning verður latin. Øll tey, ið fáa tekst sín á prent í Vencili, fáa samsýning.

### Upplestur á heimasíðu Vencils

Ritstjórnin ger eisini vart við, at Vencil hevur sína egnu heimasíðu á http://www.vencil.fo, har nógv áhugavert og forkunnugt tilfar longu er at finna um tað at skriva skaldskap. Eisini annað tilfar, bæði kunnandi og løtubært tilfar til rithøvundar, týðarar og onnur bókmentafólk er at finna á heimasíðuni, sum javnan verður dagførd og víðkað við nýggjum tilfari.

Sum nakað heilt nýtt hava teir báðir ritstjórarnir, Oddfríður Marni Rasmussen og Arnbjørn Ólavsson Dalsgarð, í hyggju at brúka heimasíðuna hjá Vencili til annað enn tekst. Ætlanin er nevniliga at skipa fyri upplestri av yrkingum, sum skal varpast út beinleiðis á alnetinum frá heimasíðu Vencils. Men hetta fara fólk at frætta meira um, tá ið fyrireikingarnar eru komnar longri.

Í hesi syftu snýr tað seg um næsta nummar av Vencili, sum kemur út um hálvan mars. Freistin at lata inn tilfar er altso hósdagin 1. februar 2007.